ALMANNA- OG MENTAMÁLARÁÐIÐ
MINISTRY OF SOCIAL AFFAIRS AND CULTURE

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3Postboks 208
110 Tórshavn

24. mai 2023
J.nr: 23/10863-4
Tygara skriv:
Viðgjørt: Barbara Álvsdóttir Thomsen

Nr. 52-100/2022

Fyrispurningur eftir tingskipanini § 52 a

Fyrispurningur um heim í Suðuroynni fyri borgarar við avbjóðingum, settur landsstýriskvinnuni í almannamálum, Sirið Stenberg (at svara skrivliga eftir TS § 52 a)

Fyrispurningurin er soljóðandi:

1. Nær kann væntast, at heimið í Suðuroynni letur upp?
2. Hvussu nógv búpláss verða á heiminum?
3. Hvørjir borgarar fáa búpláss?
4. Hvussu nógv umlættingarpláss verða á heiminum?
5. Er ætlanin at hava annað virksemi á heiminum?

Til nr. 1
Tingingar hava verið millum Almannaverkið og útleigara um leigusáttmála fyri bygningin har ætlaða virksemið skal vera, og eftir ætlan verður leigusáttmáli undirskrivaður í næstum.

Annað virksemi er í bygninginum í løtuni, og tá verandi virksemi er flutt út fyri summarferiuna, verða neyðugar tillagingar gjørdar í bygningin, so at Almannaverkið kann yvirtaka leigumálið síðst í 3. ársfjórðingi 2023 og væntandi byrja virksemið hjá Almannaverkinum í 4. ársfjórðingi 2023.

Til nr. 2
Sum tekningarnar síggja út í løtuni, so eru tað tvær 2-rúms-íbúðir og fýra 1-rúms-íbúðir. Tilsamans er talan um 7 pláss.

Til nr. 3
Ætlanin er, at bjóða borgarum, sum eru á bíðilista til bútilboð í Suðuroynni, pláss. Her er talan um borgarar við ymiskum diagnosum, sum vit meta kunnu trívast at búgva saman.

Tað er óvist, hvussu tørvurin fer at vísa seg at vera, men hugsanin er, at bústovnurin fer at hava 5 búpláss og 2 umlættingarpláss.

Til nr. 4
Almannaverkið metir, at tvey umlættingarpláss er hóskandi. Sí annars svarið omanfyri.

Til nr. 5
Í løtuni er ikki ætlanin at hava annað virksemi í húsinum.

Sirið Stenberg
landsstýriskvinna